VINNUMÁLARÁÐIÐ

Stjóri fyri Strandfaraskipum Landsins

Søkt verður við hesum eftir stjóra fyri Strandfaraskipum Landsins.

Starvið
Stjórin hevur ábyrgdina av at leiða, reka og menna Strandfaraskip Landsins.

Arbeitt hevur verið við at gera karmar fyri framtíðar virkseminum hjá Strandfaraskipum Landsins sum ein samferðslueind.

Strandfaraskip Landsins hevur ábyrgdina av øllum sáttmálum, ið landið ger við privatar um keyp av flutningstænastum og hevur um hendi rakstur av tænastum, ið ikki verða bjóðaðar út.

Ein av høvuðsuppgávum stjórans verður at tryggja framhald av hesum arbeiði, umframt at fremja týdningarmiklar verkætlanir, sum eru í umbúna.

Førleikakrøv
Vit vænta okkum av umsøkjarunum, at teir m.a. hava:

- Holla teoretiska útbúgving
- Leiðsluroyndir frá privata og/ ella almenna arbeiðsmarknaðinum
- Góð samstarvsevnir og mennandi leiðslustíl

Setanarviðurskifti
Setanarøkið er Vinnumálaráðið og stovnar undir tí. Starvið verður sett sambært serligari avtalu.

Umsókn
Umsóknin við prógvum o.ø. skal sendast til Vinnumálaráðið, postrúm 377, 110 Tórshavn, ikki seinni enn 18. oktober 2002.

Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Arna Poulsen, aðalstjóra, í Vinnumálaráðnum, tlf. 356060.

Um Strandfaraskip Landsins
Strandfaraskip Landsins er landsfyritøka undir Vinnumálaráðnum og hevur til uppgávu at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi og skal í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði.

Á Strandfaraskipum Landsins starvast tilsamans umleið 180 starvsfólk.

Tórshavn 23.09.2002

Vinnumálaráðið

Linjuformaður søkist til Elfelagið SEV í Suðuroy

Eitt starv sum linjuformaður í Suðuroy er leyst at søkja í sambandi við, at ein av linjuformonnum okkara fer úr starvi vegna aldur tann 1. januar 2003.

Starvið:
Starvið umfatar hald og nýgerð av býtisvirkjum hjá SEV í Suðuroy, t.v.s. há- og lágspenningslinjur, kaðalar og trafostøðir. Undir ábyrgd yvirfyri og í samstarvi við kaðal- og linjumeistaran fyri Suðuroynna skal linjuformaðurin arbeiða sum partur av - og sum formaður fyri - arbeiðsholdum við linjumonnum.

Førleikakrøv:
Vit kundi hugsað okkum, at umsøkjararnir hava elinnleggjaraprógv ella aðra viðkomandi útbúgving, t.d. maskinmeistari ella elektrikari. Aðrir við viðkomandi útbúgving so sum jarn- ella húsasmiður við áhuga og evnum at seta seg inn í tøknibúnaðin innan býtisvirkir okkara, kunnu eisini søkja.

Harafturat skal viðkomandi hava evnir at leiða og býta dagliga arbeiðið ímillum linjumenninar.

Neyðugt er at hava koyrikort til vanligan persónbil. Eisini er neyðugt at hava kroppsligan førleika til at kunna luttaka aktivt í gravi- og linjubyggiarbeium, bæði á sløttum og í fjøllum.

Lønin:
Lønin verður sambært 4. lønarflokk eftir sáttmála millum SEV og Starvsmannafelagið.

Lønin verður ásett eftir starvsaldri frammanundan.

Byrjunar- og endaløn í nevnda lønarflokki er í løtuni netto ávikavist kr. 18.527,- og kr. 20.855,- um mánaðin.

Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi ávikavist kr. 2.101,- og kr. 2.365,- um mánaðin.

Frá 1. mars 2003 hækkar bruttolønin 4%. Harafturat hækkar eftirlønargjaldið við 1% av bruttolønini.

Nærri upplýsingar:
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Mathias Lassen, kaðal- og linjumeistara á tlf. 373016 ella 210465.

Umsóknir:
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið SEV, Box 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 1. november 2002.

Tórshavn, tann 20. september 2002.

Elfelagið SEV
Postboks 319, 110 Tórshavn
Teloefon (0298) 311366
Telefax (+298) 310366, E-mail sev@sev.fo

Maskinmeistari søkist til Elfelagið SEV

Eitt starv sum maskinmeistari hjá SEV er leyst at søkja til setan frá 1. januar 2003 í samandi við, at ein av maskinmeistarum okkara fer úr starvi vegna aldur.

Starvið:
Talan er um eitt starv sum maskinmeistari á Eiðisverkinum, sum er undir leiðslu av leiðaranum av Fossáverkinum í Vestmanna.

Eiðiðsverkið umfatar í løtuni vatnorkustøðina á Brimnesi við byrgingum og uml. 25 km av samlitunlum við tilhoyrandi áarinntøkum og luftholum umframt rakstrartunlar v.m. Sjálv orkustøðin hevur í løtuni tvær vatnturbinur upp á 6,3 MW hvør.

Eiðisverkið verður fjarstýrt frá Fossáverkinum í Vestmanna, og er starvið tí undir vanligum umstøðum dagarbeiði.

Harafturat skal tann, ið settur verður, vera til reiðar at fáa álagt vaktgangandi maskinmeistaraarbeiði á Fossáverkinum í ávísum førum, fyri meginpartin sum avloysari í summarhálvárinum. Umframt rakstur og stýring av vatnorkuverkunum snýr hetta starvið seg eisini um m.a. stýring av øllum háspenningskervinum í meginøkinum.

Eisini kann í serstøkum førum vera neyðugt at fara til arbeiðis á Eiðisverkinum uttanfyri vanliga dagarbeiðstíð.

Førleikakrøv:
Kravt verður, at viðkomandi hevur fulla maskinmeistaraútbúgving, t.v.s. viðkað maskinmeistaraprógv ella 3 ára maskinmeistarskúlaprógv ella javnbjóðis útbúgving.

Harafturat er neyðugt, at viðkomandi hevur koyrikort til vanligan persónbil og er kroppsliga nóg vael fyri at kunna ganga í fjøllunum í sambandi við eftirlit við og arbeiði á áarinntøkum, byrgingum v.m.

Lønin:
Starvið er lønt sambært avtalu millum SEV og Maskinmeistarafelagið í 4. lønarflokki (tó so, at fyri ta tíð, viðkomandi avloysir sum vaktmeistari á Fossáverkinum, er talan um 5. lønarflokk).
Lønin verður ásett eftir starvsaldri.
Byrjunar- og endaløn í 4. lønarflokki er í løtuni netto ávikavist kr. 20.533,- og kr. 22.104,- um mánaðin. Harafturat verður goldið í eftirlønargjaldi tilsamans ávikavist kr. 1.905,- og kr. 2.051,- um mánaðin.

Umsóknir:
Umsóknir skulu saman við prógvum og møguligum ummælum sendast til Elfelagið SEV, Box 319, FO-110 Tórshavn, og skulu vera SEV í hendi í seinasta lagi tann 28. oktober 2002.

Nærri upplýsingar:
Nærri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til Pól Joensen, verksmeistara á Fossáverkinum á tlf. 424433 ella til Bjarka Hermansen, deildarleiðara á telefon 311366.

Elfelagið SEV
Postboks 319, 110 Tórshavn
Teloefon (0298) 311366
Telefax (+298) 310366, E-mail sev@sev.fo

Sosialurin Lesið Sosialin -tað loysir seg!

VIÐMERKINGAR

Øravík/Hov-tunnilin er neyðugur!

Nita Næs
Nes, Hvalba

Hví er tað so torfört at fáa tingvaldu menninir Johan Dahl, Hendrik Old, Jóannes Eidesgaard og Hergeir Nielsen úr Suðuroy at raðfesta Øravík/Hov-tunnilin fram um alla aðra útbygging í oynni?

Sum fólkavaldir løgtingsmenn hava hesir menn, um vilji og dirvi er til staðar, møguleika at fáa hetta sera týdningamikla arbeiði í gongd. Allir sum ein lovaðu á politiskum fundum, ið vóru undan valinum, at hesin tunnil skuldi gerðast veruleiki, fingu teir veljarans álit. Álitið fingu tit, so nú er at vísa ábyrgd og föra framtíðar dreymir í verki.

Politikkur er at vilja, hava vit jú so mangan hoyrt. Politikkur má eisini vera at tora. Ein løgtingsmaður eigur at tora at taka avgerðir, eisini tá ið avgerðirnar kunnu fáa fylgir, ið ikki eru so væl sæddar í egna vældømi. Tað var tí ørkymlandi og skuffandi at frætta í Degi og Viku, at okkara løgtingsmenn úr Suðuroy enn einaferð hava arbeitt so mikið eftir hali, at Landsstýrismaðurin í vinnumálum kemur til ta niðurstøðu at eingin Øravík/Hov-tunnil verður gjørdur í nærmastu framtíð. Tað minti ikki sørt um sum, tá ið smá børn klandrast um sama bommi, sama bilin og mamman so má blanda seg uppí og tala at. Høvdu t.d. Johan Dahl, Hendrik Old, Hergeir Nielsen og Jóannes Eisesgaard havt visiónir fyri vøkru oyggj okkara, og visiónir fyri tingarbeiðinum, so høvdu teir duga at hugsa langt og stórt. Men tað duga teir ikki og hetta er stórt spell! Tað er at hugsa ov stutt, um fólkavaldir løgtingsmenn einans gera ein vørr, tá ið Smyril ikki siglir á Vág, ikki siglir á Tvøroyri, ella tá ið Smyril er í verkfalli. Visióninar mugu verða okkurt annað enn sjálvur gamli Smyril. Og um tit fýra hugsa tykkum um, so er tað sera láturligt at Smyril hvørja viku skal fara ein túr á Vág? Og enn meira láturligari, at tit hava lógarfest hetta. Í staðin skuldu tit havt lógarfest og samarbeitt soleiðis, at Smyril einans siglur á Tvøroyri og at vit hava/ fáa eina góða farma/ferðaflutningshavn á Tvøroyri. Við slíkari mannagongd høvdu tit víst á, hvussu týdningarmikið tað er at fáa ein góðan tunnil og eitt gott vegasamband í alla oynna.

Havnin í Vági skuldi, júst sum í dag, verið ein fiskivinnuna. Tær ábøtur, sum í dag krevjast, skulu sjálvsagt gerast, so vit fáa eina góða fiskivinnuhavn í Vági. Alt annað tos um t.d. tvær líka stórar og kostnaðarmiklar havnir í Suðuroy er skilaleyst og gevur onga meining. Vágur og Tvøroyri skulu hava hvør sítt at bjóða fram til brúkaran. Og gamla mynstrið har alt verður gjørt upp í krónum, hvat verður gjørt frá almennari síðu á Tvøroyri, mótvegis hvat verður gjørt í Vági - skal burtur. Oyggin skal formast eftir einum mynstri, har ein hevur alla Suðuroynna í huganum, tá ið avgerðir verða tiknar og ikki sum nú einans einstøk valdømi. Hugsingarhátturin hjá løgtingsmonnunum er avoldaður. Helt at kreppan hevði køvt slíkan hugburð. Tey ungu í dag og flest fólk hugsa ikki so sum politikkarir gera. Hetta er sera løgið, tí tað eru vanlig fólk, ið verða vald á løgting, tey eru vanliga skilagóð og vilja øllum so sera vael. Tá so arbeiðsgongdin byrjar, hendir alt ov ofta, at hesu somu fólk, púrasta hava mist hómingina av, hvat er týdningarmikið, hvat hevur skund, hvat kann broytast, o.s.fr.

Hovsegg. Hetta orðið hava vit fingið inn við móðurmjólkini. Vegasambandið millum Øravík og Hov býtir ikki einans Suðuroynna fysiskt í tveir partar, hetta strekkið býtir okkum so sannuliga eisini psykiskt í tveir partar. Serliga vetrahálvuna. Er t. d. eitt kvøldskúlaskeið í Vági ella Porkeri ein vetur, ið hvalbingar ella tvøramenn eru áhugaðir í, eru tað vissu mong í setast aftur, tí tey ikki hætta sær at koyra um Hovsegg. Kom tunnilin vóru ikki slíkar fróðingar og við tíðini var tað als einki at tosa um, hvar á oynni tey ymisku tiltøkini vóru. Ein góður tunnil millum Øravík og Hov hevði havt eina savnandi megi við sær, hetta hevði verið allari oynni at gagni. Eg eri púra samd við Marneri Lisberg, har hann skrivar um trygdina hjá miðnámsskúlanæmingum. Og við dulnevnda suðringinum, ið skrivar um júst hetta sama. Flest fólk (suðringar sum norðingar) hava hesa áskoðan, tí er tað neyðugt, at løgtingsmenninir gera nakað við hetta mál.

Var skerjingin av blokkinum skilagóður vælbjargisbolitikkur ella?

Johan Dahl
løgtingsmaður

Við útgangsstøði í ivaleyst bestu vinnuligu tíðum í Føroyum nakrantíð, síðan vit fóru frá bóndasamfelagnum til fiskivinnusamfelag, valdi samgonguskútan undan hesari at skerja ríkisveitingina við 366 mió krónum.

Útgangstøðið er, at vit framhaldandi koma at spinna gull av fiskivinnun og eini alivinnu, sum í løtuni er í sera tungari aldu, eins og ein komandi oljuvinna skuldi verða komandi hornasteinur í inntøkum okkara framyvir.

Hesi seinastu tvey kunnu ikki sigast annað enn at verða ivasamar inntøkur í løtuni.

Eisini frættist, at búskaparvøksturin er steðgaður, og m.a. Strandferðslan hevur gjørt greitt, at teir ikki rokna við nøkrum vøkstri í komandi ári.

Tað sær út til, at einans eitt evarska lítið yvirskot verður á figgjarlógini fyri 2002, - kanska eitt stað millum 70 og 100 mio - **og er hetta áðrenn avdráttir eru goldnir av skuld.**

Samgonguskútan hevur ikki havt tann byr, sum ein skuldi væntað hóast bæði adoptivbarnið og Miðflokkurin hava svorðið fullveldiseiðin, so sær tó longu út til, at vátt er komið í reiðrið, og stór ósemja er innanborða um trý sera viðkomandi evnir sum eru:

- Yvirtøkan av fólkakirkjuni
- Lógina um skrásett parlag/arvarættin
- Hvussu teir skulu fáa komandi figgjarlóg at hanga saman.

Eg haldi, at tað er lítið hugsað um vælferðarsamfelagið Føroyar, - tann vanliga føroyingin, mannin og kvinnuna á gøtuni og komandi ættarlið og teirra sosialu trygd framyvir, - tá ríkisveitingin verður skerd uttan himpr og **uttan arða inntøku at seta ístaðin.**

Hvat verður t.d. gjørt fyri at skapa nýggjar vinnur ella vinnumøguleikar?

Er nøkur ítøkilig ætlan um, hvar tær mistu inntøkurnar skulu koma frá framyvir?

Um ikki, so eru bert tvinnar arðar loysnir, og tað verða skerjingar av almenna sektorinum ella skattur og avgjøld koma at hækka.

Hvat siga fólkafloksmenn til støðuna, jú tað skal eg siga tær - teir tosa Gud hjálpi mær framvegis um skattalætta, hóast framtíðarútlitini eru alt annað en ljós.

Samgongumenn siga, at um vit høvdu havt tær skerdu 366 milióninnar - ja so høvdu tær bara blivið brúktar álíkavæl!

Tað høvdu tær ivaleyst, tí tað eru sera nógv økir, sum liggja á láni og istaðin fyri at skerja blokkin við kr. 366 mio. pr. ár - kundu nevnda upphæddin verið partvís gjald til at :

- Tryggja øllum føringum eina rímiliga eftirløn - við at latið tær 366 mio pr. ár farið til at hækka t.d. støðisfæið í samhaldsfasta eftirlønargrunninum.
  Innan 4 ár vildi hendan upphædd fyriuttan rentuinntøkur verið vaksin til kr. 1.464 mio - altso næstan 1,5 milliard.
  Rentan av hesi upphædd, um hon var sett í útlendsk lánsbrøv hevði verið uml. 6% p.a. og hevði hetta givið ca. 310 mio afturat teimum 1.464 mio - ella uml. 1,8 milliard í 4 ár!!!!!!

Eisini kundi einans eit tára niðurskurður verið nýttur til at:

- Goldið nýggju suðuroyarferjuna og stóran part av havnaútbyggingunum til somu.
- Goldið komandi Norðoyartunnilin kontant
- Goldið 2-3 nýggj Ellis-og Røktarheim .
- Givið okkara heilsuverkið neyðugu ábøturnar og útbyggingar, sum sigast at krevja yvir milliardina.
- Goldið uttanlandsskuld .

Tað er sera ringt at fáa eyga á tað skilagóða í hesum politikki.

Ein sera illa umhugsað gerð eftir mínum tykki - har ikki sær út til at verða tikin hædd fyri fylgjunum.

Fullveldi fyri einhvønn pris – rokningina gera vit upp aftaná – er felagssangurin hjá sitandi samgongu.

i urin